# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 4/2024**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: 07 Vestur kærir FC Hoyvík fyri brúk av ólógligum leikara vegna vantandi yvirsiting, 1. og 3. deild menn** | |
| Deild: 3. deild menn | Hvør hevur reist málið: 07 Vestur |
| Kapping: Landskapping | Aga- og etiskanevndin móttikið kæru: 8. juli |
| Møguligt brot framt: 26. juni 2004 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

**Úrskurður**

Staðfest er, at FC Hoyvík hevur brotið grein 8, stk. 1 í Kappingarreglunum við tað at leikarin Manni Næs Mortansson fyrst leikti við 1. deild monnum 22. juni og síðani við 3. deild monnum 26. juni, uttan yvirsiting av dysti.

At gera brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at slík brot verða revsaði við, at felagið verður dømt at tapa dystin í teirri deild, sum leikarin leikti ólógliga.

FC Hoyvík verður tí dømt at tapa dystin móti 07 Vestur, sum varð leiktur 26. juni við málmuninum 0-3 sambært § 6, bókstav g í 3. reglubroti í aga- og etisku reglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

FC Hoyvík kann sambært grein 10, bókstav f í 1. reglubroti, kæra úrskurðin til Yvirkærunevndina. Freistin at kæra er 5 dagar.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

FC Hoyvík hevur viðurkent brotið í partshoyringini og harmast um, at COMET-skipanin ikki forðar fyri, at leikarar, sum ikki lógliga kunnu flyta niður í lægri deild, kunnu veljast á dómaraseðilin.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í aga- og etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

**Fakta í málinum**

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar á dómaraseðlunum.

Staðfestast kann, at Manni Næs Mortansson fyrst leikti við 1. deild monnum 22. juni og síðani við 3. deild monnum 26. juni, uttan í millumbilinum at hava sitið dyst yvir.

**Lógarverkið**

Kappingarreglurnar áseta í grein 8, stk. 1, at leikarar ikki kunnu flyta úr hægri deild niður í lægri deild at leika, uttan at hava yvirsitið dyst.

Sambært § 6 í aga- og etisku reglugerðini, kunnu persónar og feløg verða dømd agarevsing fyri brot á fótbóltsregluverkið.

# AGA- & ETISKANEVNDIN

| Staðfestingar, metingar og niðurstøða |
|---|
| Aga- og etiskanevndin staðfestir, at leikarin fyrst leikti við 1. deild fyri síðani at leika við 3. deild, uttan at yvirsita dyst. Hetta er brot á grein 8, stk. 1 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.<br><br>Avleiðingin er, at FC Hoyvík verður dømt at tapa dystin í 3. deild við málmuninum 0-3, sí grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í aga- og etisku reglugerðini og grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. |
| **Kæruvegleiðing** |
| Sambært grein 10, litra f í aga- og etisku reglugerðini, kann úrskurðurin um at FC Hoyvík tapir dystin, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin. |
| **Staður, dagfesting og undirskrift:**<br><br>**Tórshavn 10. juli* 2024**<br>Anni á Hædd<br>Anni á Hædd<br>forkvinna<br><br>*Av misgávum bleiv úrskurðurin ikki avgreiddur mótvegis FSF fyrr enn 27.8.2024 |
| Í Aga- og etiskunevndini eru: Anni á Hædd, forkvinna og løgfrøðingur, Eli Thorsteinsson, næstformaður og løgfrøðingur, Ken Nónklett, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Sissal Kj. Kristiansen, sniðgevi og ráðgevi. |